Viðmerking:

# Hesaferð – hinaferð

Í august 1946 – ein mánað fyri fólkaatkvøðuna um loysing – varð ein bóklingur við heitinum FØROYAR borin hvørjum húsi og heimi í Føroyum.

Formælið til bókina var soljóðandi:

**Formæli:**
Føroyingum stendur nú í boði at taka við ognar- og yvirvaldsrættinum til land sítt, Føroyar.

Tjóðarviljin er tann, at tikið verður við hesum rætti: at vit sjálvir eiga landið og sjálvir ráða yvir tí.

Føroyingar mugu tí vita, hvussu teir skulu røkja og umsita henda ognarlut sín.

Til tess at gera fyrireikingarstarv hesum viðvíkjandi hava menn og kvinnur – úr øllum politiskum flokkum her á landi – stovnað felagsskap. Hetta er *Føroyingafelag – Felag fyri Føroya frælsi.*

Tey uppskot, sum hesin felagsskapur hevur latið gera, verða kunngjørd Føroya fólki í hesum uppriti, sum her er prentað.

Hetta eru sjálvsagt bert *uppskot. Hvussu land okkara fer at verða stýrt,* hvørt tað verður nakað soeiðis sum her verður skotið upp ella á annan hátt, tað fer fólkaviljin – fyrst og fremst soleiðis sum hann kemur til sjóndar í politiskum flokkum á fólkavalda lóggávutingi landsins – at ráða fyri. Eyðvitð ber til at stýra og umsita landið á mangan hátt og betri enn her er greitt frá. Tað sum *hetta rit* hevur sett sær fyri er við orðum og tølum: 1. at prógva, at land okkara *kann* skipast sum frítt og frælst ríki og 2. at vísa á *eina av teimum mongu leiðum* sum føra á hetta endamál.

Hesi formælisorð biðja vit fólk hava í huga, tá tey lesa hetta rit.

*Tórshavn í august 1946*
FØROYINGAFELAG

**Fíggjarlógaruppskot fyri árið 1947.
Samandrigið.**

1. DEILD

*Inntøkur:*

| | | |
|---|---|---|
| 1. | §. Skattur, tollur og onnur almenn gjøld | 6.400.000 |
| 2. | §. Vinningur av rakstri ríkisstovnanna | 500.000 |
| 3. | §. Inntøka av virðisbrøvum o.ø. | 50.000 |
| | | 6.950.00 |

II DEILD

*Útreiðslur:*

| | | |
|---|---|---|
| 4. | §. Hægsta stjórn landsins | 48.000 |
| 5. | §. Løgtingið | 122.000 |
| 6. | §. Stjórnmálarráðið | 402.000 |
| 7. | §. Løgreglumál | 376.000 |
| 8. | §. Dómsmál | 118.000 |
| 9. | §. Lækna- og heilsumál | 1.203.000 |
| 10. | §. Samgongumál | 1.382.000 |
| 11. | §. Skúla- og mentamál | 1.353.000 |
| 12. | §. Kirkjumál | 200.000 |
| 13. | §. Vinnumál | 354.000 |
| 14. | §. Sosial mál | 1.079.000 |
| 15. | §. Ymiskar eftirlønir og studningar | 35.000 |
| 16. | §. Til at taka | 278.000 |
| | | 6.950.000 |

Hetta var ongin glæstriútgáva á glitaðum pappíri og við vøkrum litmyndum. Nei, góðskan var sum wc-pappír av tí bíligara slagnum, óivað tí frægari var ikki at fáa, 5-ára heimsbardagin hevði sorlað alla framleiðsluorku í Europa og Asia.

Bóklingurin var sett upp soleiðis:
- Ognarrættur til Føroyar
- Uttanlandsviðurskifti
- Innanlandsviðurskifti
- Fíggjarlógaruppskot fyri árið 1947
- Frágreiðing og viðviðmerkingar
- Stjórnarskrá Føroya (grundlóg)

Fíggjarlógaruppskotið sá soleiðis út:

Vert er at geva sær far um, at fyribrigdið »skiftistíð« als ikki verður nevnt í bóklinginum, men av uppskotinum til fíggjarlóg framgongur, hvussu landsins fyrisiting skal skipast:

– Hægsta stjórn landsins
við einum forseta

– Løgtingið

– Stjórnarráð við einum
ráðharra
ríkisbókhaldara
ríkisgrannskoðara

– Uttanríkismál við einum
sendiharra í Bretlandi
sendiharra í restini av Europa
sendiharra í Amerika
og við konslum í ymiskum londum, sum tó onki skuldu kosta

– Løgreglumál við
løgreglustjóra (fúti)
sýslumonnum
løgreglu- og tolleftirlitsmonnum
fangahús
skipasýn
ymisk eftirlit

– Dómsmál við
hægstarættardómara
lægrirættar dómara

Lækna- og heilsumál við
5 (fimm) sjúkrahúsum
landslækna
fylkislæknum
kommunulæknum
ljósmøðrum

– Samgongumál við
aðalverkfrøðingi
vitum v.m.
Postverk (0,00 kr. hvíla í sær sjálvum)
Telefonverk (0,00 kr. hvíla í sær sjálvum)
Innanoyggja sigling
Útvarp og veðurstøð

Kirkjumál við
bispi og prestum

Skúla- og mentamál við
øllum landsins skúlum
og ymiskum studningum

– Vinnu- og handilsmál
við studningum til landbúnaðin, handverk og ídnað, handilskúla og húshaldsskúla

– Sosial mál

– Eftirlønir og studningar

Stjórnarskrá Føroya (grundlóg) er í 73 greinum, av teimum eru 28 um forseta Føroya, men § 30 ljóðar soleiðis »Peningaviðurskiftini verða skipað við lóg«. Í viðmerkingum til búskaparmál er tilskilað, at í fyrstu syftu skal lóg gerast um peninga- og bankamál landsins við einum landsbanka.

Undir »innanlandsviðurskiftum« er tilskilað, at Føroyar verða frítt tjóðveldi, og at »reglurnar um stjórnarskipanina verða skrivaðar í stjórnarskrá (grundlóg)«. Eisini er ein útgreining av embætisverkinum, men hvaðan tað skal koma ella útvegast, fáa vit ikki at vita. Sum kunnugt var tá í tíðini so at siga alt embætisverkið mannað við donskum tænastu- og embætismonnum.

Tað er trupult at ímynda sær barnið, gitið í nationalitiskum veitsluróma og tongforloyst við einum politiskum manifesti á so berum botni, sum tað í veruleikanum var talan um.

At vit, hóast tað at samfelagið fór á húsagang 3 ár eftir at heimastýrislógin var farin at virka, komu so væl burtur úr ruðuleikanum, kunnu øll fegnast um.



Hatta var hinaferð, og so er tað hesaferð!

At pappírs- og prentlistin er nógv broytt síðan 1946, er bóklingurin »Frá heimastýri til fullveldi«, sum nú um dagarnar varð borin hvørjum húsi og heimi í Føroyum, gott dømi um: Snotilig perma, mynd og glitað pappír mín sann, vøkur skræða hevur gandað mangan mann.

Hesaferð er tað ikki »Føroyingafelag«, ið er útgevari, men Føroya landsstýri (landskassin) og formælið til bóklingin er undirskrivað av løgmanni og tveimum landsstýrismonnum vegna Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Tað er ikki heilt av leið at halda, at útgáva og avgreiðsla av hesum riti hevur kostað skattaborgarunum umleið tað, sum Kirkjumál varð mett at kosta í 1946.

Triumvirati, sum hevur undirskrivað formælið, vónar, at bóklingurin fer »at bøta um førleikan hjá fólki at kjakast um og taka støðu til málið um framtíðarstøðu Føroya«.

Kjak í góðum týdningi kann loysa truplar spurningar og vandamál, men vánaligt kjak – klandur – loysir ikki úr góðum.

Á síðu 4 í bóklinginum eru nevndar 5 ásanningar, sum fekk verandi samgongu »at seta kós móti føroyskum fullveldi«. Ein av hesum ásanningum er, at vantandi vit um og ávirkan á tað, sum hendir í okkara egna landi – serliga í okkara fíggjarheim –, var orsøkin til, at samfelagið fór so rúkandi á heysin, og at »kreppan fyrst í nítiárunum gjørdist so hørð«.

Álvaratos, er hetta ikki at undirmeta ta vitan og tey ráð og tær ávaringar, sum okkara politikarar í eini 35 ár hava fingið frá Búskaparráðnum og Det økonomiske råd? Og ársfrágreiðingarnar frá landsstýrinum/ríkisumboðnum í eins nógv ár: Er eingin dygd í teimum?

Nei, tað sanna man vera, at tær mongu løgtingslógirnar – kanska einar 80 í tali – við ongum kunngerðum ella reglugerðum um landskassaveðhald, landskassaútlán og landskassastudning til skip og virki máaðu burtur støðið undir tí føroyska búskapinum. Tær drenaðu landskassan og kostaðu skattaborgarunum milliardaupphædd. Hesar løgtingslógir vórðu jú eisini settar úr gildi, meðan kreppan leikaði á av tí harðasta. Hetta og onnur eyðmýkjandi tiltøk er ætlandi triðja orsøkin til, at samgongan setti »kós móti føroyskum fullveldi«: »Vit ásannaðu, at føroyskir myndugleikar vórðu tiknir av ræði hesi árini«.

Ella vóru kanska aðrar orsøkir til, at kreppan »gjørdist so hørð«? Blokkurin?! Men hann kom ikki fyrr enn í 1988 við avtalu 9. mars 1987 millum landsstýrið og stjórnina. Undir punkt 4 í avtaluni er tilskilað, at »Færøernes hjemmestyre kan inden for rammerne af gældende lovgivning frit disponere over bloktilskuddene«.

Tað hevði verið áhugavert at fingið at vita, hvat ið teir báðir løgmaður og statsministarin løgdu í orðingina »inden for rammerne af gældende lovgivning«. Hugsaðu teir um lógirnar við relation til tey fimm ministeriini, nevnd undir sama petti í avtaluni, ella hugsaðu teir bara um lóglýdni í vanligum týdningi?

Teir eru báðir enn í góðum árum.

**Heri Mohr**

*Tubbaksráðið – spuningar og svar um tubbak:*

# »Hví tað loysir seg at gevast!«

*Eg havi roykt í 20 ár. Er ikki longu ov seint?*

Nei! Tey góðu tíðindini eru, at tað er ongantíð ov seint at gevast. Tú skerjir vandan fyri sjúkum, ið standast av tubbaki, næstan alt fyri eitt, tú heldur uppat at roykja, sjálvandi er betri, skjótari tú gevast.

Eftir:

tjúgu minuttum tekur nøgdin av tubbakseitri at minka og blóðtrýstið, hjartasláttурin og pulsurin verða aftur sum tey eiga at vera. Hetta ger, at vandin fyri hjartaslagi minkar

tólv tímum – nøgdin av kolsúrevni í blóðinum minkar og nøgdin av súrevni økist

einum mánaði fert tú at duga betur at meta um, hvussu okkurt angar og smakkar. Lungnapípurnar verða smidligari, so tað verður lættari hjá tær at draga andan. Kroppurin hevur stríðst við at endurbøta nervalagið. Tú fert kanska at varnast, at tú orkar meira

tveimum til trimum mánaðum fært tú kanska 30% av lungnavirki aftur. Tú fert at orka meira og føla, at tú fært gjørt fleiri kropsvenjingar.

seks til níggju mánaðum – útlitini til at tú fært lungnasjúku eru minni, tí kyknurnar, sum klæða lunguni, nú aftur verða so sum tær skulu vera og gera sítt til, at lunguni hjá tær eru rein og heilsugóð

einum ári – vandin fyri, at tú fært hjartasjúku er skorin niður í helvt, tú hevur eisini skert vandan fyri striki, lungnasjúku og fleiri sløgum av krabbameini, teirra millum lungna-, hálsa- (lívmóðurhálsa-), bløðru- og nýrakrabba og krabba í brisi, barkakýla og vælindi

fimm árum – vandin fyri at tú fært lungnakrabba er umleið helvtina av vandanum hjá honum, ið roykir ein pakka um dagin

tíggju árum – vandin fyri at tú fært lungnakrabba er næstan líka lítil sum hjá einum, ið ikki roykir! Frískar kyknur eru komnar í staðin fyri tær kyknurnar, ið koma áðrenn krabbameinskyknurnar koma.

Tikið úr »Tá ið síðsta sigarettin er roykt«, Amerikanska tubbaksráðið. 1995, 1996.

Gevst tú at roykja, skerjir tú eisini vandan fyri at tey, sum eru uttan um teg og anda roykin frá tær niður í seg, verða sjúk.

Næstu ferð: Vandin við at vera passivur roykjari.



Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Vestmenningar í eyðkenda stílinum

***10–mannafør:** Eysturoyingurin, sum hesa ferð róði meir seigan enn kappingarneytarnir, kom ongantíð fyri seg og var dyggiligga settur upp á pláss*



*Vestmenningar ætla sær upp aftur á føroysku kappróðrartrúnuna, og fyrsta stigið á leiðini varð tikið leygardagin*
***Mynd: Jan Müller***

Punktum varð seinnapartin leygardagin sett fyri einum tíðarskeiði sum í kappróðrarsøguni ivaleyst fer at vera tiltikið. Eysturoyingurin, sum síðani hann fyrstu ferð luttók – tað var á norðoyarstevnu í 1998 – hevur vunnið allar tólv FM róðrarnar, tapti og tað so dyggiliga.

Eysturoyingar fingu vánaligan start. Teir lógu á fimta plássi fyrstu løtuna, og teir komu so at siga ongantíð fram um fjórða plássið, sum teir endaðu á.

– Vit høvdu roknað við, at kappingin í ár fór at verða gerast harðari, enn hon var í fjør, sigur ein av manningini á Eysturoyingi. Og tað vísti seg, at metingin hjá teimum, sum hava vunnið so nógv, var røtt.

Tað vóru tríggir nýggir bátar við í kappingini, og teir endaðu á teimum trimum fremstu plássunum. Nýggi Vágbingurin skuldi eisini vera við, men teir vóru so óhepnir í Vági vikuna undan norðoyarstevnuvikuni, at báturin fekk skaða. Tí fóru teir til Sumbiar, læntu 10–mannafarið har suðuri, sproytaðu hann í svart/hvíta litinum hjá Vágbingi, men sjálvandi var tað ikki heilt tað sama at rógva í einum gomlum báti, sum tað hevði verið at róð í einum spildurnýggjum báti.

**Nervarnir uttaná**

Tøgnin og intensiteturin vóru øgilig, tá Hallur Ellingsgaard og Jákup Sørensen løgdu tey seks 10–mannaførini. Havnarbáturin sprakk avstað, áðrenn startskotið gekk av. Tað fekk hann gula kortið fyri.

Umborð á fleiri av hinum bátunum vildu teir vera við, at Havnarbáturin eisini í seinnu startroyndini hevði tikið fyrsta takið, áðrenn skotið gekk av.

Dómarin varð spurdur um hetta, men hann gav ikki kappingarneytunum hjá Havnarbátinum rætt. Um Havnarbáturin hevði fingið tvey gul kort í sama róðri, so hevði hann einki stig fingið.

Vestmenningar vóru ikki heilt klárir, tá skotið gekk av. Teir mistu eini tvey ella trý tøk, og tað gekk ein løta, áðrenn teir komu fyri seg.

– Vit hingu alla tíðina uppií, men tað var ikki fyrrenn vit komu inn móti beddingini, at vit kendu, at vit vóru millum teir í oddinum, og vit vóru ikki langt frá málinum, tá eg var greiður yvir, at vit vóru frammanfyri allar hinar.

Hetta sigur Jan Johannesen. Hann er bátsformaður á Vestmenningi. Hann situr á lærinum í bakborði, og tí var hann tann seinasti at síggja aftur á Nólsoyingin og Havnarbátin.

**Veldug kapping**

Jan Johannsen heldur, at norðoyarstevnuróðurin boðaði frá, at kappingin verður øgilig í ár. Havnarbáturin hevur ofta staðið seg væl á eitt túsund metrum, og leygardagin vóru teir umborð á Havnarbátinum rættuliga stívir teir fyrstu tveir triðingarnar av málinum. Nólsoyingurin vísti leingi, at knotur eru í teimum, og ivaleyst fer tað at laga seg betri hjá eysturoyingum seinni á árinum.

Vestmenningurin var í gamla lagnum leygardagin. Tað var ikki fyrrenn á síðsta triðinginum av málinum, at hann vísti størri treiskni enn hinir og smeyg sær framum.

Umborð á Vestmenningi er bara vant róðrarfólk. Sammett við manningina í fjør eru tveir skiftir út, men talan er um nýggjar menn, sum frammanundan hava róð nógv við øðrum bátum.

Hetta er níggjunda árið, at bátsformaðurin er við Vestmenningi. Teir vunnu á norðoyarstevnu í 1997, og tað minnist Jan Johannesen sera væl:

– Tað var eg, sum koykti fótin, tá vit runnu ein túr, áðrenn vit fóru í bátin. Eg var so illa fyri, at teir vóru noyddir at binda fótin upp, men tað gekk alíkavæl. Hesa ferð høvdu vit einki óhapp, og tað var stuttligt at koma aftur til Vestmannar, har eini fýra hundrað fólk vóru møtt at taka ímóti.

Í síðstu viku nevndu vit, at Eysturoyingur hevði skift fleiri menn, og at onkur var farin av, tí hann var illa skaddur. Ein av nýggju monnunum hevði bara lovað seg til norðoyarstevnuna. Mánakvøldið kom ein nýggjur maður umborð. Hetta er ein, sum áður hevur róð nógv við Skálabátinum.

JH

**Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:**
***www.sosialurin.fo***

## Støðan í FM-kappingini

*Støðan eftir fyrsta FM-róðurin er uppgjørd niðanfyri. Fremsti báturin fær 7 stig, meðan bátarnir frá nr. 2 til 6 fáa ávíkavist 5, 4, 3, 2 og 1 stig*

**5-mannafør, dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 7 stig |
| 2 | Havfrúgvin | 5 stig |
| 3 | Kollur | 4 stig |
| 4 | Drekin | 3 stig |
| 5 | Sílið | 2 stig |
| 6 | Royndin Fríða | 1 stig |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 7 stig |
| 2 | Hvessingur | 5 stig |
| 3 | Fuglfirðingur | 4 stig |
| 4 | Gongurólvur | 3 stig |
| 5 | Sólmundur | 2 stig |
| 6 | Riddarin | 1 stig |

**5-mannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 7 stig |
| 2 | Beinta | 5 stig |
| 3 | Ørnin | 4 stig |
| 4 | Drekin | 3 stig |
| 5 | Hvassi | 2 stig |
| 6 | Sílið | 1 stig |

**6-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Hvessingur | 7 stig |
| 2 | Hósvíkingur | 5 stig |
| 3 | Kollfirðingur | 4 stig |
| 4 | Strálan | 3 stig |
| 5 | Gongurólvur | 2 stig |
| 6 | Sólmundur | 1 stig |

**8-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 7 stig |
| 2 | Toftabáturin | 5 stig |
| 3 | Nevið Reyða | 4 stig |
| 4 | Gullbrandur | 3 stig |
| 5 | Oyndri | 2 stig |
| 6 | Kviviksingur | 1 stig |

**10-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vestmenningur | 7 stig |
| 2 | Havnarbáturin | 5 stig |
| 3 | Nólsoyingur | 4 stig |
| 4 | Eysturoyingur | 3 stig |
| 5 | Vágbingur | 2 stig |
| 6 | Klaksvíkingur | 1 stig |